## Sofies verden á føroyskum

Í sambandi við, at Josvein Gaarder vitjar listastevnuna 6-15 august, koma tvær av bókum hansara út á føroyskum. Tríggjar bøkur eftir hann eru longu týddar. Tær eru Jólagátan, Kabalugátan og Sum í spegli, sum í gátu. Laura Joensen hevur týtt hesar bøkurnar, og hon skal eisini týða aðra av teimum báðum bókunum, sum koma út í summar. Tað verður bókin við upprunaheitinum Appelsinpiken. Á listastevnuni fer Laura Joensen eisini at lesa upp úr hesi bókini.

Hin bókin, sum verður týdd, er tann heimskenda heimspekisbókin fyri børn, Sofies Verden. Bókin er týdd til óteljandi mál, og í summar kemur hon so út á føroyskum eisini. Tað er Edward Olsen, sum í fleiri ár hevur arbeitt við at týða bókina. Føroyska heitið verður Heimurin hjá Suffíu. Bøkurnar verða givnar út av Bókadeild Føroya Lærarafelags.

eys

## Jørgen Niclasen aftur til Danmarkar

Mikudagin 28 apríl fer Jørgen Niclasen aftur á fund í Danmark, fyri at greiða frá um fiskidagaskipanina. Hesuferð er tað matvørunevndin hjá danska fólkatinginum, sum hevur sent boð eftir Jørgeni. Har verður eisini ein íslendskur fiskufrøðingur við.

Vikuna eftir, koma m.a. danski matvøruráðharrin Marianne Ficher Boel til Føroya, fyri at kunna seg enn betri um føroysku skipanina.

Jens Christian Larsen, sum er limur í matvøruráðnum, sigur, at danskarar skulu læra av føroyingum, tá tað kemur til havið. Hann sigur, at føroyingar liva av havinum, og hava tí verið noyddir at finna eina skipan, sum bæði fiskivinnan og fiskifrøðingar kunnu vera nøgdir við.

Jørgen Niclasen hevur annars verið bæði í Scotlandi, Onglandi, Írlandi og Danmark og greitt frá um skipanina, so stórur áhugi er fyri henni.

eys

## G! Festivalurin fingið stuðul

Herfyri frættist, at árliga tiltakið á Gøtusandi, G! Festivalurin, varð í vanda at verða avlýstur, vegna vantandi fíggjarliga orku.

Men nú kunnu allir G! fjepparar gleðast aftur, tí Føroya Banki og Grót hava nú skrivað undir eina sponsoravtalu av festivalinum. Sum ætlað verður tónleikur at hoyra á Gøtusandi 16. og 17. juli 2004.

Á heimasíðuni hjá Konto In er møguleiki at keypa sær atgongumerki til festivalin, og at frætta tey feskastu tíðindini um tiltakið.

Eitt av høvuðsnøvnunum á G! í ár, verður uttan iva svenska Lisa Ekdahl, sum bleiv kend við lagnum Vem vet. Hon hevur vunnið nógvar prísir uttanlands, fyri sín sermerkta jazzfólkatónleik. Hetta verður fyrstu ferð, at kendi sangfuglurin kemur at framføra í Føroyum.

eys



# Næstan útselt til listastevnuna



*myndatekstur: longu nú er um at verða útselt til nøkur at tiltøkunum á listastevnuni, sum verður í august*

*mynd: savnsmynd*

**Tey, ið vilja síggja Jethro Tull mugu taka beinini á nakkan, vilja tey ogna sær eitt av fáu atgongumerkjunum, sum eru eftir**

LISTASTEVNAN
*Eydna Skaale*
*Eydna Skaale@sosialurin.fo*

Listastevnan hevur veruliga fingið eina dreyma byrjan, hvat ið undirtøku viðvíkur. Fyrireikararnir hava valt longu nú at byrja søluna av atgongumerkjum til fýra konsertir, og eftir øllum at døma endar sølan til hesar eisini nakað skjótt. Bert 22 atgongumerkir til standipláss eru eftir til Jethro Tull konsertina í Norðurlandahúsinum 11 august, har pláss verður fyri 900 fólkum.

Tað er tó ikki bara rockurin ið dregur, eisini kenda operasangarinnan Kiri Te Kanawa hevur drigið føroyingar eftir atgongumerkjum. Til hennara konsert rúmast 382 áskoðarar, og uml. helvtin av atgongumerkjunum eru longu seld. Í heyst sang hon fyri fullsettum sali í Reykjavík, og í Álborg var áhugin fyri henni eisini sera stórur.

Sølan er somuleiðis byrjað til konsertina hjá írsku Celtic Tenors, sum spæla bæði siðbundnan og nýggjari írskan fólkatónleik. 382 pláss verða til hesa konsertina, harav nøkur og trýss eru seld.

Forsølan er eisini byrjað til einastu konsertina, sum Teitur Lassen fer at hava her heima á klettunum í ár. Til hansara konsert rúmast millum 400 og 500 fólk, og har hava fólk eisini ligið framvið fyri at tryggja sær atgongumerki.

### Nógv at arbeiða við

Oddvá Nattestad, skrivari fyri listastevnustýrið, sigur, at undirtøkan millum listafólki er sera góð. Tey hava fingið nógvar fyrispurningar frá útlendskum listafólki, sum ynskja at luttaka. Hon sigur, at skráin er um at koma uppá pláss, og at teimum nú bert manglar nøkur smáting, sum hon væntar fara at koma í rættlag heilt skjótt.

Hon staðfestir eisini, at eftirspurningurin eftir stevnuni er so stórur, at longu nú liggur nógv niðurfyri til stevnuna komandi ár.

Av áhugaverdum tiltøkum í ár verða, umframt nevndu konsertir, t.d., føroyska skaldsøgukappingin, har 11 handrit eru innkomin, eitt stórt sápubløðrusirkus, marionettdukku framførsla, alment prát við Josevein Gaarder, sum m.a. hevur skrivað bókina um Sofies Verden, framsýning við glasskulpturum hjá Tróndi Patursyni og ein fyrilestur um Niels Finsen og føroyska gransking.

Listastevnan verður hildin 6. til 15 august, og fyrireikararnir siga, at atgongumerkjasølan til hini tiltøkini allarhelst fer at byrja í juni.

# Áskoðarin myndar sjónleikin



Alzheimerfelagið hevði aðalfund tann 25.april í auluni á Føroya Læraraskúla, og tá var frumsýning av leikinum »Svíkja vit Hannis«. Tað vóru starvsfólk og onnur, sum framførdu sjónleikin, ið snýr seg um fólk við demenssjúkum. Sjónleikurin krevur av áskoðaranum, at hann fylgir væl við, tí hesin er eisini við til at skapa sjónleikin.

- Tey spæla fyrst leikin einaferð, og síðani spæla tey umaftur, og tá er tað, at áskoðarin kann blanda seg uppí. Hetta er jú inni á einum røktarheimi, og tað er um ein dementan mann. Og har kann áskoðarin so siga frá, hvussu tey heldur høvdu gjørt tað, og so broytist sjónleikurin, sigur Sigrun Mohr, forkvinna í Alzheimerfelagnum.

Alzheimerfelagið hevði eisini aðalfund, og bert ein limur tók ikki við afturvali. Tað var Kári Árting, men í hansara stað kom Sigborg Arge. Øll hini tóku við afturvali.

Alzheimerfelagið varð stovnað fyri trimum árum síðani undir MFB, og felagið hevur umleið 300 limir.

hkm



# Kvinnur onga atgongd til veiðuloyvini

**Fiski- og aliloyvisskipanin er ein stongdur heimur fyri kvinnur. Tí áttu politikarar at havt umhugsað eina kynskvotering av loyvunum, áðrenn skipanin varð sett í gildi. Hetta hevði ikki minst komið alivinnuni til góðar, nú hon meir enn nakrantíð hevur brúk fyri øðrvísi hugsunarhættum og nýggjum kreftum. Hetta kom millum annað fram á Kvinnuráðstevnuni seinasta leygardag**

KVINNURÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Kvinnurnar hvørva úr hagtølunum, tá vit nærkast leiðslunum í føroyska vinnulívinum. Spurningurin er, um tað er, tí tær ikki halda seg framat, ella tí vinnan er skipað á ein slíkan hátt, at dyrnar meir ella minni eru stongdar fyri kvinnunum.

Ingvør Nolsø, leiðari á reklamuvirkinum Stephanssons Hús og Marita Rasmussen, samskipari av fiskivinnugranskingini, umboðaðu føroyska vinnulívið á Kvinnuráðstevnuni á Hotel Hafnia leygardagin.

### Ein kvinna á toppinum …

Ingvør Nolsø er ein av kvinnuligu veteranunum í føroyska vinnulívinum og undagongukvinnu í kvinnurørsluni í Føroyum.

At kvinnur ikki síggjast aftur í leiðslunum í vinnulívinum er sum so onki nýtt. Hvørki her heima ella aðrastaðni, minti Ingvør á. Og tað er eyðsæð, at okkurt má broytast fyri at venda skeivu gongdini. Tann áhugaverdi spurningurin er, um tað er vinnan ella kvinnan sum skal broytast, helt Ingvør, sum í síni tíð sjálv tók málið í egnar hendir og stovnaði sítt egna reklamuvirki.

– Í Danmark stovna kvinnur oftast sítt egna virki, tí tær vilja sleppa at arbeiða annaleiðis.

Tær uppfata ofta siðbundnu fyritøkurnar sum snævurskygdar, hierarkiskar, konservativar og nógv merktar av maktspæli. Við at stovna sína egnu fyritøku, kunnu tær laga hana eftir sínum egnu virðum, sum eru øðrvísi enn tey í fyritøkum, sum eru stýrdar av monnum. Og okkurt bendur á, at tað júst eru hesi virðini, nógvar fyritøkur hava brúk fyri. Ein kanning fyri og onnur eftir vísir nevniliga, at ein kvinna á toppinum, merkir eitt gott úrslit í botninum.

### Skapið netverk!

– Okkurt bendir sostatt á, at tað er vinnulívið og ikki kvinnurnar, sum skulu broytast. Ikki tí kvinnurnar eru lýtaleysar. Tær áttu millum annað at lagt seg nógv meir eftir at skapa eitt sínamillum netverk, soleiðis sum mannfólkini altíð hava gjørt tað. Tað hava tær ikki gjørt, og tí standa tær veikari, serliga í hesum tíðum, har eitt sterkt netverk í vinnulívinum hevur alt at siga. Eitt sterkt netverk er ikki bara neyðugt. Tað fremur eisini ein serligan solidaritet, sum vit kundu ynskt okkum at sæð meir av millum kvinnur í føroyska vinnulívinum, segði Ingvør Nolsø.

### Bert ein kvinnuligur stjóri

Marita Rasmussen hevur nógvar royndir frá føroysku fiskivinnuni og er nýliga vorðin samskipari av allari granskingini á økinum.

Marita hevði kannað, hvussu nógvar kvinnur eru eigarar, stjórar ella virkisleiðarar í ali- og fiskivinnuni. Og ikki óvæntað vísa tølini, at hóast ein stórur partur av arbeiðsmegini í fiskivinnuni er kvinnur, sæst hetta ikki aftur í teimum leiðandi størvunum. Ongin kvinna situr í ovastu leiðsluni í alivinnuni, og ongin eigur skip ella er skipari. Ein ella tvær standa skrásettar sum reiðarar, men eru tað ivaleyst mest av navni. Heldur ikki á fiska- ella kryvjivirkum fann Marita nakran kvinnuligan eigara ella stjóra, men longur niðri á stiganum sóðust ikki so fáar kvinnur sum millum annað góðskuleiðarar og formenn.

Einasti kvinnuligi stjórin í føroysku fiskivinnuni er sølustjórin á Kósavirkinum í Klaksvík.

### Ognarleysur samfelagsbólkur.

– Skulu vit royna at grundgeva fyri, hví kynsbýtið í ovastu leiðsluni í fiskivinnuni er so skeivt, er tað lætt at peika á, at kvinnur sera sjáldan søkja hesi størvini, segði Marita. Men tað er ikki einasta orsøkin. Veruleikin er, at fiskafyritøkur lýsa helst ikki ikki eftir fólki til tey leiðandi størvini. Tær leita heldur sjálvar eftir tí rætta persóninum við at brúka síni netverk og spyrja seg fram.

– Ein onnur orsøk er, at í teimum loyvisavmarkaðu vinnunum, har flestu loyvini longu eru givin, er tað sera trupult at sleppa framat, um tú ikki hevur nógvan pening ella strategiskar samstarvsfelagar. Í hesum sambandi vísti Marita eisini til átøðið hjá norðmanninum Ottar Brox, sum hevur kannað avleiðingarnar av loyvisavmarkaðum skipanum. Hesin vísir á, at tey ungu og aðrir ognarleysir bólkar sleppa ikki upp í part í einastu lønandi vinnuni í nógvum strandalondum. Og kvinnur eru sum heild partur av teimum ognarleysu samfelagsbólkunum.

### Kynskvotera loyvini.

Sum er, eru útlitini fyri at sleppa kvinnum framat í hesi vinnunni sostatt ógvuliga vánalig.

Vit hava eina politiska skipan, sum tryggjar okkum umboð úr øllum landinum, og ført hevur verið fram, at hendan skipan eisini átti at tryggjað báðum kynum somu atgongd til landsins leiðslu.

– Í prinsippinum ber tað væl til at flyta hendan hugsunarháttin yvir á loyvisavmarkaðu vinnurnar, bæði sum ein liður í bygdamenningini og fyri at tryggja báðum kynum somu rættindi til øll øki í okkara høvuðsvinnu. Men hetta áttu politikarar at havt hugsað um, áðrenn loyvisskipaninar vórðu settar í verk, tí tað ber ikki til at koma afturumaftur nú 10 ár seinni, uttan at tað fær víðfevndar avleiðingar, segði Marita.

– Um kvinnur við hóskandi førleikum vilja sleppa framat hesi vinnuni, kunnu tær bjóða seg fram sum strategiskir samstarvsfelagir saman við fyritøkum ella persónum, ið ætla at gera íløgur í hesa vinnur. Tað upplagt at gera tað beint nú, ið alivinnan liggur í andaleypi og kanska meir enn nakrantíð hevur brúk fyri fakligum førleikum, øðrvísi hugsunarhættum og nýggjum eldhugaðum kreftum, helt Marita Rasmussen.



*Marita Rasmussen er samskipari av føroysku fiskivinnugranskingini.*



*Hugskotið um at kynskvotera veiðuloyvini vakti áhuga millum kvinnurnar á Kvinnuráðstevnuni*



*Makt er ikki nakað, tú fært. Makt er nakað, tú tekur, minti Ingvør Nolsø luttakararnar á Kvinnuráðstevnini á*